Tíðindaskriv frá føroyska/íslendska Handilskamarinum

Búmerkjakapping til føroyskt/íslendskt handilskamar

10. november verður Føroyskt/Íslendsk handilskamar stovnað í Føroyum.

Í hesum sambandi verður bjóðað til búmerkjakapping. Uppskot skulu verða okkum í hendi seinasta lagi 5. november 2012, og skal sendast í telduposti til kristin@chamber.is

Vinnarin fær eitt gávukort, ið er ein flogferðaseðil millum Føroyar og Ísland og heimaftur (skattur og avgjøld er ikki íroknað), eitt íslendskt lambstjógv ella eitt turt tjógv.

Leiðslan í Føroyska-Íslendska handilskamarinum boðar frá, hvør hevur vunnið kappingina fyrst í november mánað.

Uppskotini skulu sendast inn í myndaformati (png ella jpg) og vektorformati (feks. EPS= í tveimum støddum. Á einari síðu stórt format 1000 x 1000 px í lítlum formati 150 x 150 px.) Eftir kappingina verður búmerkið ogn hjá Føroyska –Íslendska handilskamarinum, og vil verða brúkt á heimasíðuni, á brævpappíri og marknaðarføringstilfari frá handilskamarinum.

Kappingin er opin fyri øll.

- Vinnandi uppskotið skal vera orginalt í sniðinum.
- Uppskotið skal vísa, at talan er um tvílanda samstarv millum Føroyar og Ísland
- Uppskotið skal bera teir litir, ið fløggini hava: blátt, reytt og hvítt.

Til samanberingar ber til at hyggja eftir búmerkjum á heimasíðuni hjá Íslendska Viðskiftaráðnum http://www.vi.is/althjodasvid.

Um føroyskt íslendskt handilskamar

- Ein bólkur av fyritøkum, feløgum og einstaklingum, sum luttaka í samhandlinum millum Føroyar og Ísland
- Hevur til endamáls at fremja samhandilin millum Føroyar og Ísland í mun til vørur og tænastur, flutning og íløgur
- Er eitt sosialt netverk fyri samskifti millum fyritøkur, feløg og einstaklingar og er eitt forum fyri samskifti við almennu myndugleikarnar
- Er eitt amboð til samskifti millum londini
- Verða við til flyting av vitan í spurningum, sum viðvíkja handlissamstarvinum millum Føroyar og Ísland bæði nú og í framtíðini
- Verða viðkomandi til at lætta um og styrkja um netverk og vinnulívið í londunum
- Halda fundir, verkstovur og ráðstevnur og hjálpa til, tá almennar og vinnuligar vitjanir eru

Stuðlað búmerkjakappingini hava Atlantic Airways og Faroe Ship

ATLANTIC AIRWAYS FAROE SHIP